# AÐALFUNDUR 2014




ÍTRÓTTASAMBAND FØROYA

# Formansfrágreiðing 2013-2014

# ÍSF 75 ár

*Til aðalfund Ítróttasamband Føroya 13. juni 2014*

Tú alfagra land mítt,
mín dýrasta ogn!
á vetri so randhvítt,
á sumri við logn,
tú tekur meg at tær
so tætt í tín favn.
Tit oyggjar so mætar,
Gud signi tað navn,
sum menn tykkum gávu,
tá teir tykkum sóu.
Ja, Gud signi Føroyar, mítt land!

Hin roðin, sum skínur
á sumri í líð,
hin ódnin, sum týnir
mangt lív vetrartíð,
og myrkrið, sum fjalir
mær bjartasta mál,
og ljósið, sum spælir
mær sigur í sál:
alt streingir, ið tóna,
sum vága og vóna,
at eg verji Føroyar, mítt land.

Eg nígi tí niður
í bøn til tín, Gud:
Hin heilagi friður
mær falli í lut!
Lat sál mína tváa
sær í tíni dýrd!
So torir hon vága
– av Gudi væl skírd –
at bera tað merki,
sum eyðkennir verkið,
ið varðveitir Føroyar, mítt land!

## Starvsnevndin

*Forseti:* Petur Elias Petersen
*Varaforseti:* Petur Ove Petersen
*Skrivari:* Anna Rein

## Starvsfólk


*Ítrótta- og ungdomsráðgevi:*
Annika H. Lindenskov


*Ítrótta- og ungdomsráðgevi:*
Jarvin Feilberg Hansen

## Stjórnin


*Forseti:*
Petur Elias Petersen


*Varaforseti:*
Petur Ove Petersen


*Nevndarlimur:*
Anna Rein


*FSF:*
Christian F. Andreassen


*HSF:*
Kristian Johansen


*FBF:*
Jákup Fjallsbak


*RSF:*
Jan Herman Hansen


*SSF:*
Jon Hestoy


*FFS:*
Elin H. Joensen


*BSF:*
Erik Engerbrecht Thomsen


*ÍSB:*
Jógvan Jensen


*JSF:*
Sofus Johannesen


*BTSF:*
Jóannes Guttesen


*FÍF:*
Hallur Holm


*RF:*
Hjalmar Petersen


*SKF:*
Sjúrður Knudsen


*SST:*
Kjartan Egholm


*DSNÍ:*
Martin N Simonsen


*BSKF*
Schandorff Vang



## Sersambondini

### *FSF*
Forseti: Christian Andreassen
Varaforseti: Róin Schrøter
Fríðin Ziskason
Jákup Martin Joensen
Heðin D. Poulsen
Trygvi Mortensen
Jógvan Páll Joensen

### *HSF*
Formaður: Kristian Johansen
Næstforkvinna: Margrið Weihe
Bogi Jacobsen
Egill Steintórsson
Eydna Mikkelsen

### *FBF*
Formaður: Jákup Fjallsbak
Næstforkvinna: Rúna Hentze
Jana Egholm

### *RSF*
Formaður: Jan Herman Hansen
Næstformaður: Poul John Æðustein
Jakku Guttesen
Súnhild Holm
Paula Eikhólm
Martin Simonsen

### *SSF*
Formaður: Jon Hestoy
Næstformaður: Rókur í Jákupstovu
Anni á Hædd
Hanna í Horni
Sørin Djurhuus

### *FFS*
Forkvinna: Elin Heðinsdóttir Joensen
Joan Petersen
Rósing Dam
Harald Joensen
Helen Gaardbo
Jastrid Weihe

### *BSF*
Formaður: Erik Engerbrecht Thomsen
Næstformaður: Mogens Eriksen
Herborg á Mýruni

### *ÍSB*
Formaður: Jógvan Jensen
Næstformaður: Hans harryson
Tóra Norðgerð
Jón á Steig
Jóhan Samuelsen

### *JSF*
Formaður: Sofus Johannesen
Næstformaður: Zvonko Mrdalo
John Kjær

### *BTSF*
Formaður:Jóhannes Guttesen
Næstformaður:Jens Pauli Nolsøe
Rógvi Thorsteinsson

### *FÍF*
Formaður:Hallur Holm
Næstformaður: Niels Jákup Jakobsen
Guttorm Sørensen
Jonhard Larsen
Sunniva Bjarnastein

### *RF*
Formaður: Hjálmar Petersen
Næstformaður: Brandur í Dali
Zakaris Reinert Jacobsen

### *SKF*
Formaður: Sjúrður Knudsen
Jóannis Joensen
Herleif Hammer
Leif Klein
Allin Simonsen

### *SST*
Formaður:Kjartan Egholm
Næstformaður: Gunnar Dahl Olsen
Høgni R. Øster

### *DSNÍ*
Formaður: Martin N Simonsen
Næstformaður:Anna Sofía Fjallheim
Kristian Dahl
Allan Larsen
Ingi Samuelsen

### *Bogaskjótisamband Føroya*
Formaður: Schandorff Vang
Næstformaður:Jógvan Magnus Andreasen
Jógvan Niclasen
Jastrid M Jensen

*Grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið JANUAR*

## Nevndaryvirlit

*Olympisknevnd Føroya*
Petur Elias Petersen
Petur Ove Petersen
Anna Rein

*Oyggjaleikanevndin*
Petur Elias Petersen
Petur Ove Petersen
Anna Rein

*Ítróttasdómstólurin*
Anna Dam
Anja Hovgaard
Poul Hansen
Børge B. Hansen
Jóhan Lamhauge
Eyðhild Skaalum, varalimur
Julianna Klett, varalimur
Elna Skylv Hansen, varalimur

*Dopingnevnd*
Jónfinn Thomsen, formaður
Jóhanna Arge
Pál Weihe
Jógvan Ellefsen, varalimur

*Dopingeftirlitsnevnd*
Sofus Johannesen, formaður
Sølvi Winther Olsen, næstformaður
Annika H. Lindenskov, skrivari
Jón á Steig
Petur Oluf Joensen
Jens Jensen

*Ítróttagrunnur Føroya*
Niels Nattestad, formaður
Álvur Hansen, skrivari
Tóra Norðgerð
Annika H. Lindenskov
Petur Ove Petersen

*Ítróttasavn Føroya*
Johannes Joensen, formaður
Petur Ove Petersen
Palli Ziskason, kassameistari
Andrass Sólstein, skrivari
Katrin Joensen
Ruben Andresen, varalimur
Sofus Johannesen, varalimur







## Inngangur

Í apríl gjørdist Ítróttasamband Føroya 75 ár. Hesi árini hava túsundtals fólk íðkað og skipað fyri skipaðum ítróttavirksemi kring allar Føroyar. Í kríggi og friði, búskaparligari vælferð og kreppu, á sumri og vetri hava eldsálir ótroyttiliga lagt til rættis, so vit øll kunnu røra okkum og njóta serliga samanhaldið og likamligu vælveruna, sum ítrótt gevur okkum.

Onkur limafeløg hjá ÍSF eru gomul, vælskipaði og siðbundin. Onnur eru nýggj og eru í eini tilgongd, har ein hóskandi skipan og felagsmentan skal finnast. Í øllum hesum virksemi – frá yngsta íðkaranum til elsta – og frá motionistinum til úrvalsítróttafólkið – eru feløg, sersambond og ÍSF alneyðugir partar.

Leikluturin hjá Ítróttasambandi Føroya er tann mest yvirskipaði – at røkja samstarv við almennar myndugleikar og út í heim, og at hava efirlit og at veita tænastur til aðrar partar av ítróttaskipanini.

Samstundis er neyðugt at vísa á ymisk viðurskifti, sum hava týdning fyri føroyska ítrótt. Eitt av hesum er heilsufremjandi leikluturin hjá ítróttini. Motión og rørsla eru rættiliga sett á breddan seinasta áratíggju. Tað er natúrligt, at fólk, sum hava fingist við ítrótt á ungum árum, leita aftur til ítróttarrørsluna, tá tey leita eftir rørslutilboðum. Hetta setir tó økt krøv til ítróttina, eitt nú innan gransking í ítrótt og fólkaheilsu, og til førleikamenning av teimum leiðarum og venjarum, ið skulu skipa rørslutilboðini hjá ítróttini.

Rørslutilboð innan skúlans gátt eru týdningarmikil partur av heilsufremjan. Við at leggja góðar røsluvanar niður í okkara børn og ungu geva vit teimum ein førning, sum tey fáa gleði av alt lívið. Framhaldsdeildir kring landið hava tikið stig til ítróttarbreytir, og er tað at fegnast um. Ítróttasamband Føroya fer at heita á myndugleikarnar at stuðla hesum verkætlanum, og samstundis at økja talið av tímum, ið verða settir av til ítrótt og rørslu øll skúlaárini. Skúlin er í eini serstøðu, vit tað at hann kann røkka hvørjum einstakum barni í øllum skúlaárgangunum.

Ítróttasamband Føroya hevur seinatu árini við stuðli frá tí almenna lagt seg eftir at styrkja úrvalsarbeiðið innan føroyska ítrótt. Eitt tað besta dømið um hetta arbeiðið eru framúr úrslitini hjá Pál Joensen, sum eru bygd á miðvísa venjing og hópin av venjingarlegum og kappingum. Skipanin við úrvalsítrótt verður støðugt ment.

Góðir og nútímans karmar eru avgerandi fyri virksemið hjá feløgum kring landið eins væl og hjá landsliðunum. Landið hevur í alt størri mun latið tað upp í hendurnar á kommununum at gera íløgur í ítróttarverkløg. Vit fegnast um mongu verkætlanirnar kring landið, og vilja áhaldandi heita á land og kommunur um at samstarva um at dagføra verandi ítróttarverkløg og at veita teimum ítróttagreinum, ið ikki hava góðar umstøður, betri kor. Nevnast kunnu golf, tennis, skjóting, bogaskjóting, eins og ítróttarhøllir altíð vísa seg at mangla.

## Samstarv við tað almenna

**FERÐAKORTINI**

Strandfaraskip Landsins fór í 2011 undir eina nýggja tilgongd við at skifta terminalarnar út í bussum og ferjum. Í hesum sambandi skuldu øll gomlu kortini skiftast út við nøkur nýggj kort, og nýggj nýtsluvegleiðing varð eisini gjørd og samtykt av stjórnini. Vit mugu staðfesta, at hendan tilgongdin hevur ikki verið nøktandi fyri okkara ítróttafólk. Enn eru ikki allar maskinur íbundnar – og hetta er ikki als ikki nøktandi.

ÍSF fekk lovað, tá nýggju maskinurnar vóru íbundnar, at fáa nágreinilig hagtøl fyri nýtsluna av íróttaferðum hjá ÍSF, men enn er hetta ikki verueiki.

Vit kunnu staðfesta, at t. d. bussleiðin ikki longur egnar seg væl til flutning av ítróttafólki. Túratalið er minkað – og mangan er ikki kapasitetur til lið, sum skulu ferðast við bussunum. Tá kapasitetur ikki er, setur SSL nýggjan buss inn, og er hetta sera kostnaðarmikið fyri ÍSF.

ÍSF fer í nærmastu framtíð at viðgera ítróttaferðir við Strandferðsluni nærri. Núverandi skipan er ikki haldbær – og neyðugt verður við broytingum hesum viðvíkjandi.

## ÍSF

**ÍSF 75 ÁR – BÓKAÚTGÁVA**

Fríggjadagin 4. apríl 2014 gjørdist Ítróttasamband Føroya 75 ár. Í tí sambandi varð nýggj bók løgd fram, sum serliga lýsir seinastu 25 árini hjá ÍSF og føroyskari ítrótt. Ítróttasavnið hjá ÍSF gav bókina út, og Uni Arge skrivaði.

ÍSF varð stovnað 4. apríl í 1939 á Sjómansheiminum í Havn. Stigtakari til felagsskapin var ítróttaráðgevin, Poul E. Petersen, sum gjørdist fyrsti forsetin í ÍSF. Á stovnandi aðalfundinum vóru sjey ítróttafeløg, Neistin, SÍ, VB, EB, HB, Havnar Róðrarfelag og Havnar Fimleikafelag.

Í dag eru 16 sersambond í ÍSF og 120 ítróttafeløg. Níggju sersambond hava altjóða limaskapir.

Síðan 1989 hevur ítróttaliga menningin verið stór, ikki minst orsakað av oyggjaleikunum og altjóða luttøkuni hjá fleiri ítróttagreinum. Fleiri týðandi útbyggingar eru eisini framdar.

Nýggja bókin varð nevnd „Føroyar framá – ÍSF 75 ár." Hon lýsir gongdina seinastu 25 árini, men leitar eisini longri aftur í tíð at fáa sett gongdina í samanhang. Dentur er serliga lagdur á at geva eina heildarmynd av støðuni og ikki at siga søguna hjá hvørjum sersambandi sær.

Bøkur um ÍSF komu eisini út í sambandi við 25 ára dagin í 1964 og 50 ára dagin í 1989.



**RØÐA Á 75-ÁRA FØÐINGARDEGNUM**

**Røða, sum forsetin Petur Elias Petersen, helt á 75 ára føðingardegnum:**

**Góðu gestir**

Tað er mær ein heiður at kunna siga nøkur orð hesa hátíðarløtu, nú vit halda 75-ára stovningardag ÍSF.

Vit, sum í dag manna stjórn og nevnd ÍSF, njóta gott av tí framskygni, stovnarar ÍSF høvdu í 1939, og tí arbeiði, sum eftirfylgjandi ábyrgdarfólk í felagsskapinum hava gjørt síðani. Ítróttasamband Føroya hevur sum felagsskapur við einari støðugari tilgongd ment seg hesi 75 árini.

Vit, sum mannað hava stjórn ÍSF hesi árini, vita, at talan kanska ikki altíð hevur verið um eina tilvitaða og skipaða menning, men at hon er hend so við og við, sum ein avleiðing av støðugt broyttum fortreytum, nógvum orðaskifti og hørðum arbeiði – ein støðug tillaging í bestu meining.

Fyrr í dag fingu vit, í Posthúskjallaranum, í hendi snotiliga bók, ið greiðir frá søguni hjá ÍSF og føroyskari ítrótt við denti á tey seinastu 25 árini. Saman við bókini, ið var gjørd í samband við 50-ára dagin í 1989, minna hesar bøkur okkum á høvuðstættirnar í søgu ÍSF.

Millum serligu frambrotini kunnu nevnast skipanin við sersambondum, altjóða limaskapirnir hjá ymisku ítróttagreinunum og oyggjaleikirnir, sum Føroyar hava verið við til at ment frá síni byrjan í 1985. Handan hesar yvirskiftir liggur tó alt tað dagliga arbeiðið, sum krevst fyri at halda lív í føroyskari ítrótt, bæði yvirskipað og lokalt.

So kann spyrjast: Er ÍSF neyðugt og viðkomandi í dag, nú 16 sterk sersambond taka sær av dagliga virkseminum innan sína ítróttagrein? Mítt svar er, at ÍSF er meiri viðkomandi nú enn áður. Við fjølbroytta ítróttalandslagnum í Føroyum við so nógvum virksemi, er neyðugt at ein landsfelagsskapur samskipar virksemið og veitir serkønar tænastur til sersambond og feløg kring landið. Samskiftið er somuleiðis nógv við almennar myndugleikar og altjóða felagsskapir.

Sum persónliga anekdotu kann en nevna, at pápi mín, Niels Marius Petersen, var stjórnarlimur í ÍSF frá 1955 til 1966, og at ÍSF og ítróttararbeiði tí altíð hava verið ein partur av heiminum, sum eg vaks upp í. Og soleiðis er hjá flest øllum familjum kring Føroyar. Vit hava eitt hvørt tilknýti til føroysku ítróttarrøsluna, sum er størsti sjálvbodni felagsskapurin í landinum.

Eg trúgvi, at vit øll kunnu taka undir við, at hóast nógv tíð verður nýtt til sjálvboðið ítróttararbeiði, so ber arbeiði lønina í sær sjálvum. Uttan mun til, um vit eru virkin í feløgum, sersambondum, ÍSF ella undirnevndum tess, so gevur hetta arbeiði okkum upplivingar fyri lívið, sum vit høvdu verið fátækari fyriuttan. Vit læra somuleiðis nógv um hvønn annan, aðrar tjóðir og ikki minst um okkum sjálv.

Eg vil at enda nýta høvið at takka tykkum øllum, sum gera hesa løtuni so hugnaliga saman við okkum í kvøld, starvsnevndar- og sjórnarlimum, limum í undirnevndum hjá ÍSF, Tórshavn Býráð og ikki minst makunum, sum so trúliga stuðla okkum og mugu taka manga vaktina, tá ítróttaarbeiðið krevur okkara innsats.

Ein tøkk má eisini fara til almennar og kommunalar myndugleikar, sum í verki viðurkenna stóra týdningin, sum ítrótturin hevur, og sum spæla við, tá íløgur skulu gerast í ítróttaverkløg, og tá tørvur er á beinleiðis stuðli til arbeiði. Solmuleiðis eiga mongu sponsorarnir, sum fegnir seta sítt navn í samband við ítrótt, stóra tøkk uppiborna. Uttan stuðulskrónirnar vóru lunnar ikki undir arbeiðinum hjá feløgum og sersambondum. Partur av øllum hesum eru eisini miðlarnir, sum eldhugaðir so trúliga greiða frá virkseminum kring landið, og tá føroyingar kappast úti í heimi. Tað kemst ikki av sær sjálvum, at ítróttin fyllir so nógv í føroyska samfelagnum. Tí er neyðugt, at vit øll lyfta í felag.

Við vón um blíðan byr fyri føroyskan ítrótt.

**Takk fyri**






**BYGNAÐARBROYTINGAR**

Nógv tey seinastu árini hevur ÍSF arbeitt við uppskoti til bygnaðarbroytingar. Talið av sersambondum og feløgum er vaksið nógv, síðani núverandi bygnaður við feløgum, sersambondum, stjórn og starvsnevnd varð tikin í nýtslu.

Arbeitt hevur tí verið við at gera ein meiri tíðarhóskandi, einfaldan og smidligan bygnað. Í hesum sambandi verður skotið upp at hækka talið á starvsnevndarlimum úr trimum upp í fimm. Samstundis verða fleiri undirnevndir skipaðar, samsvarandi økta virkseminum hjá ÍSF. Stjórnin, ið við tíðini er vorðin rættiliga stór, og sum í løtuni hittist fleiri ferðir um árið, verður avloyst av einum umboðstingi, ið skal hittast í minsta lagi tvær ferðir um árið.

## Førleikamenning

**VENJARI 1**

Á heysti í 2013 skipaði ÍSF aftur fyri einum skeiði í almennu skeiðsrøðini „Venjari 1". Hetta skeiðið er nógv eftirspurt og altíð væl umtókt. ÍSF byrjaði við hesum skeiðum í 2008, og hevur tað í høvuðsheitum verið Ulrik Brøgger Balle frá DIF, sum hevur undirvíst á hesum skeiðum. Ulrik Brøgger Balle hevur dugað sera væl at lært frá sær og hevur givið nógvan íblástur til føroyskar venjarar. ÍSF og skeiðslutakararnir hava tó ynskt at undirvísingin og tilfarið er á føroyskum. Nýggji undirvísarin á hesum skeiðum er Heri Ziska, sum umframt at vera ein sera íðin og royndur venjari, eisini er útbúgving diplomvenjari og hevur áður undirvíst á skeiðum fyri FÍF.

Ítróttasamband Føroya og Eysturskúlin í Tórshavn hava í ár gjørt eina samstarvsroynd at Nám-X flokk-








urin, sum hevur ítróttabreyt, hevur luttikið á venjaraskeiðnum, Venjari 1, hjá ÍSF.

Venjari 1 er eitt grundskeið fyri venjarar og hjálparfólk innan allar ítróttagreinir. Skeiðið leggur serligan dent á námsfrøði, venjing av børnum og ungum, týdningin av góðum ítróttaumhvørvi og skaðafyribyrging.

29 næmingar hava lokið prógv sum venjari 1 og vóna vit í ÍSF at síggja tey aftur í føroyska ítróttaumhvørvinum. Tað er av sera stórum týdningi at seta venjarar við tíðliga og at geva teimum førleikar og støðugt menna tey at blíva dugnaligir venjarar. Dugnaligir venjarar skapa trivna og menna okkara ítróttafólk. Vónandi vilja fleiri skúlar gera brúk av hesum møguleika í framtíðini.

Næsta skeið í Venjari 1 verður 20. og 21. september 2014 í ÍSF-húsinum í Havn.

## SKEIÐ FYRI KASSAMEISTARUM

Ítróttasamband Føroya hevur á vári 2014 havt skeið fyri kassameistarum í ítróttafeløgum kring landið.

Millum viðgjørdu evnini hava verið: Bókhald og mannagongdir, skattlig viðurskifti og Stuðulsskipanir og MVG.

Ásannandi at they umleið 100 ítróttafeløgini á hvørjum ári fáa nýggjar nevndarlimir, hevur endamálið verið, at kassameistarar og aðrir nevndarlimir fáa innlit í uppgávurnar og ábyrgdina hjá einum kassameistara umframt vitan um bókhald, skatt, stuðulsskipanir og MVG.

## SVIM ELLA SPÆL TEG TIL BETRI HEILSU

Ítróttasamband Føroya hevur seinastu árini arbeitt við at leggja lunnar undir ítróttagransking í Føroyum. Sum ein liður í hesum arbeiði hevur Ítróttasamband Føroya saman við deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og ítróttagranskara Magna Mohr frá University of Exeter og Københavns Universitet, gjørt granskingarverkætlanina „Svim ella Spæl teg til betri heilsu". Ein granskingarverkætlan sum skal kanna, hvørja ávirkan fótbóltur, hóvlig svimjing og interval svimjing hava á heilsuna hjá kvinnum í aldrinum 35-50 ár. Kanningarparturin av granskingarverkætlanin er um at vera liðugur og nú skal arbeiðast við úrslitunum. Hesum arbeiðinum stendur Magni Mohr í høvuðsheitum fyri.

Fyrsta greinin er longu útgivin í tíðarritinum Biomed Research International. Henda greinin vísur á, hvørja ávirkan intens og hóvlig svimjing hava á heilsuna. Áhugavert er, at stutttíðar intervalsvimjing (bert 3-5 minuttir av effektivari svimjing) við sera høgum intensiteti hava líka stóra effekt sum hóvlig svimjing í 1 tíma. Svimjing kann tískil tilmælast sum effektiv viðgerð av fólki við hjartakarheilsutrupulleikum. Styrkin við svimjivenjing er, at venjast kann lutfallsliga hart uttan at liðir og vøddar verða strongir í líka stóran mun sum t. d. renning og styrkisvenjing. Mælt verður til, at intens intervalsvimjing er partur av tilíkari viðgerð.

Væntandi verður ein grein um, hvørja ávirkan fótbóltur hevur á heilsuna hjá kvinnum í sama aldursbólki, útgivin í næstum.

Hóast verkætlanin er komin at enda, so eru kvinnurnar ikki givnar at venja. Kvinnurnar, sum vóru í kontrolbólkinum, eru komnar upp í fótbóltsbólkin, og hava tær saman stovnað eitt fótboltsfelag sum kallast FC Trón. Tær venja 4 ferðir um vikuna, harav ein av døgunum við venjara.

Kvinnurnar í svimjibólkinum, venja eisini enn. Tað var tó ikki møguligt hjá teimum at fáa passandi tíðir í svimjihøllini í Gundadali, og hava tær tí hálsað um og eru farnar at venja fótbólt.

Fótbóltsfitness er vorið sera væl umtókt. Umframt hesi bæði liðini í Havn, eru lið bæði í Vestmanna og Vágum, sum venja fótbóltsfitness.

## FUNDIR VIÐ FELØG

Starvsnevndin hevur saman við umsitingini sett sær fyri at røkka út til øll feløg í landinum. Seinasta árið hevur verið vitjað í ymiskum økjum. Fundirnir hava vanliga verið skipaðir sum evniskvøld, har nomið hevur verið við m.a.: rættindir og skyldur hjá feløgum mótvegis ÍSF, antidoping, tryggingarviðurskiftir, etisku leiðreglurnar, leikmeti, skeiðsvirksemi, skattaviðurskiftir, rúsdrekka- og rúsevnispolitikkin, skrásetingarskipanina og strandferðslukortini.

Á fundunum hevur eisini verið lagt upp til orðaskifti, har feløgini hava høvi at greiða frá sínum virksemi, og hvørjar avbjóðingar tey stríðast við.

## FORELDRAFUNDIR

Ráðgevararnir hjá ÍSF hava eisini verið á nøkrum foreldrafundum. Alsamt fleiri feløg seta seg í samband við ÍSF fyri at hava okkurt innskot á foreldrafundum, sum feløgini skipa fyri. Tað er gleðiligt at síggja, at feløg skipa fyri foreldrafundum, áðrenn eitt kappingarár byrjar. Venjarar saman við foreldum/avvarandi hava her møguleikan at hittast saman við umboðum frá nevndini.

Á foreldrafundum verða viðkomandi evnir viðgjørd t. d. skrásetingarskipanin, limagjøld, vanlukkutryggingin hjá ÍSF, doping, leikmet, i dagligi raksturin hjá feløgunum o. a.

*Til ber altíð at seta seg í samband við ÍSF um tørvur er at fáa ráðgevararnar at hava eitt innlegg.*

## ASKUR

Tað var í januar í 2011, at stjórnin í ÍSF avgjørdi, at byrja arbeiði at seta í verk eina skrásetingarskipan. Skipanin fekk navnið Askur.

Orsøkin til hesa avgerð var tann, at ítróttin hevði tørv á einari hagtalsskipan. Nógvir fyrispurningar koma um hagtøl innan føroyska ítrótt og við nýggju skipanini ber til meira nágreiniligt at útvega hesi hagtøl.

Avbjóðingin hetta síðsta árið hevur verið at fingið feløgini at skráseta sínar limir. Feløgini eru øll skrásett í skipanini, men hesi mangla at skráseta sínar virknu limir í skipanina. Stjórnin avgjørdi tískil, at feløg, sum umboða sokallaðu vetraríróttargreinarnar skuldu skráseta sínar limir innan 1. mars og feløg, sum umboða summarítróttagreinarnar skuldu skráseta sínar limir áðrenn 1. mai. Limir, sum ikki eru skrásettir í skipanini eru ikki fevndir av tryggingaravtaluni hjá ÍSF og feløg, sum ikki skráseta sínar limir, hava heldur ikki rætt at nýta SSL-kortini.

Askur er ikki bert ein skrásetingarskipan. Til ber eisini at avgreiða t. d. limagjaldsviðurskiftini ígjøgnum Ask. Umleið 50 feløg hava nú nýtt hendan møguleikan. Hetta lættir munandi um umsitingarliga arbeiðið. Limir kunnu nú lætt avgreiða síni limagjaldsviðurskiftir, og fegnast feløg um júst hendan møguleikan.

Sera nógv orka hevur verið løgd í at fáa eina góða skipan. Ymiskar tillagingar hava verið gjørdar – og



ein nýtstuvegleiðing er á veg. Tað er avgjørt ikki at gera nýtsluvegleiðingina fyrr enn síðstu dagføringar av skipanini eru gjørdar.

### TALVA 1 AKTIVIR LIMIR 7. MAJ 2014




### TALVA 2




Tað eru umleið 7000 virknir limir skrásettir. Við árslok 2014 eru øll skrásett.

## ÁRSINS ÍTRÓTTANAVN

Pál Joensen varð av eini dómsnevnd hjá Kringvarpinum útnevndur ársins ítróttanavn 2013 fyri síni avrik innan svimjing seinasta árið.

Eingin setti spurnartekin við, hvørt vinnarin var rættur. Hinvegin tók nakað av kjaki seg upp um tilnevningarnar av ársins ítróttanavni 2013. M. a. sóknaðust fólk eftir avrikinum hjá Livari innan havróður.

Hóast dómsnevndin ikki varð sett av ÍSF, hevði hon í viðgerð síni avmarkað seg til at útnevna vaksin ítróttafólk, ið høvdu staðið seg væl í altjóða høpi í siðbundnari ítróttagrein. Tí vóru ymisk avrik vald frá í tilgongdini. Dómsnevndin var tilvitað um hetta, og kundi ivaleyst hugsað sær, at fleiri bólkar av ársins ítróttanavni vóru, um kappingin varð aftur.

## DOPINGEFTIRLIT

Farna árið er tað virknasta innan dopingeftirlit, síðani fyrstu royndirnar vórðu tiknar í 2003. Ikki færri enn 33 royndir vórðu tiknar í 2013. Flestu teirra vóru av luttakarum, sum luttóku á Oyggjaleikunum, men eisini vórðu royndir tiknar av fótbóltsleikarum, sum luttóku í evropeiskum kappingum, eins og kappróðrarfólki.

Flestu roynddirnar vóru negativar, men fyri fyrstu ferð fingu vit í 2013 eina positiva roynd, sum varð send til Dopingnevndini til avgerðar.

Talan var um íðkara, sum tók heilivág fyri sjúku, men sum ikki hevði undantaksloyvi (TUE) í lagi. Tað er soleiðis, at ítróttarfólk, sum mega taka heilivág fyri sjúku, skulu hava TUE (Temporary Use Exeption). „Vanlig" ítróttarfólk, sum íðka í einum felag, nýtast ikki at útvega TUE til dagligu venjingina, men ítróttafólk, sum eru í uppskoti til landslið, ella sum luttaka í øðrum kappingum uttanlands, skulu hava TUE.

Í hesum føri var talan um ítróttafólk, sum hevði verið úttikið til landslið áður og aftur hesa ferð var úttikið. Viðkomandi hevði havt TUE áðrenn, men tað var útgingið og ikki endurnýggjað, tá dopingroyndin var tikin 1. mai 2013. Ikki fyrr enn eftir at dopingroyndin var tikin, útvegaði íðkarin sær nýtt TUE.

Eftir sum hetta var okkara fyrsta dopingmál, høvdu vit samband við serkønan hjá Dansk Idrætsforbund, sum ráðgav okkum undir viðgerðini, soleiðis at vit tryggjaðu okkum, at alt fór rætt fram, og at revsingin lá á sama støði, sum líknandi brot verða revsaði aðrastaðni innan WADA skipanina.

Málið endaði við, at íðkarin varð útihýstur frá allari ítrótt í ein mánað, harav helvtin skuldi roknast upp í viðgerðartíðina, so í praksis viðførdi tað, at íðkarin skuldi halda seg frá ítrótt í hálvan mánað. Hetta við at partur av revsingini verður roknað upp í viðgerðartíðina er ikki óvanligt aðrastaðni, og var eisini við í tilráðingini, sum vit fingu frá DIF.

Málið eigur at minna øll ítróttarfólk á at hugsa um doping, tá tey taka einhvønn heilivág, og at spyrja seg fyri hjá ÍSF, um man er í iva um okkurt.





## KANNINGAR Í 2013

Í 2013 vóru ikki færri enn 31 dopingroyndir tiknar. Tær flestu millum fólk, ið luttóku á Oyggjaleikunum, men eisini onnur vóru kannaði.

**Býtið av kanningum var hetta:**

- Fótbóltur 4
- Badminton 4
- Frælsur ítróttur 5
- Fimleikur 4
- Súkkling 3
- Flogbóltur 6
- Tennis 1
- Triatlon 1
- Rógving 3

Tað vóru 27 menn og 4 kvinnur, sum vóru kannaði í 2013. 30 av kanningunum vóru negativar og ein positiv, sum greitt er frá omanfyri.

## FRAMTÍÐIN

Vit hava nú havt dopingeftirlit í Føroyum í 11 ár, so nú má tíðin vera komin at víðka uppgávuna.

Sum vit vita, so var tað ÍSF, sum tók stig til dopingeftirlitið, sum er, og tað verður fíggjað av ÍSF einsamøllum. Tað hevur so við sær, at tað bert eru limir í feløgum, sum eru undir Ítróttasambandinum, sum verða kannaðir.

Aðrastaðni vita vit, at t.d. í venjingarmiðstøðum ganga fólk, sum í størri mun enn ítróttafólk annars nýta dopingevnir. Í Føroyum eru eisini nógvar venjingarmiðstøðir komnar seinastu árini. Hvussu støðan er har í dopinghøpi, vita vit ikki, men tey rák, sum eru aðrastaðni, plaga eisini at koma hendan vegin, so vit eiga at hava eyguni við hesum eisini. Men skulu vit eisini gera kanningar í venjingarmiðstøðum, so má løgtingið upp í leikin, tí vit mega hava lóggávu, sum áleggur venjingarmiðstøðum treytir á hesum øki.

Ein gongd leið er at gera sum í Danmark, har tey hava sett í gildi eina sonevnda „smiley"-skipan, sum áleggur venjingarmiðstøðum at hava týðiligt frámerki við dyrnar, sum sigur, hvørt miðstøðin er umfatað av dopingkanningum ella ikki.

Kravið til venjingarmiðstøðirnar er ikki, at tey skulu vera umfataði av dopingkanningum, men hava tey ein „glaðan smiley", vísa tey, at tey eru umfataði av dopingkanningum, men hava tey ein „súran smiley", eru tey ikki við. Við hesi skipan síggja tey vitjandi um støðuna hjá fitnesscentrinum, tey vitja.

## ÚRVAL

Á stjórnarfundi 7. mars 2013 var avgjørt, at seta bólk mannaðan av umsitingini, starvsnevndini og stjórnini, at gera uppskot um úrvalsítróttaskipan.

Í apríl 2014 legði bólkurin fram uppskot til, hvussu úrvalsstuðulin skal útlutast.

Aðalmálið hjá Úrvali er at tryggja karmarnar hjá føroyskum úrvalsítróttafólkum. Úrval skal virka fyri og grunda sínar avgerðir á:

- At støðið í allari føroyskari úrvalsítrótt alsamt hækkar, so flest møgulig ítróttafólk náa altjóða støði



- At tað koma at verða fleiri føroysk úrvalsítróttafólk á heimsstyrkilistanum í síni ítróttagrein.
- At menna og stuðla serliga evnaríkum og ágrýtnum ítróttafólkum, sum kunnu gerast úrvalsítróttafólk
- At menna og stuðla evnaríkum ungdómum, ið hava nátt ella hava útlit innanfyri eitt avmarkað tíðarskeið, at náa altjóða úrslit
- At gera tað møguligt hjá úrvalsítróttafólki at sameina ítrótt, útbúgving og arbeiði

Fyri at vera ein partur av úrvalsskipanin er neyðugt, at ítróttafólkið kann bólkast í ein av hesum bólkunum:

*1. bólkur:* Ítróttafólk sum eru í topp 10 í EM, HM, OL og PL, skulu kappast undir føroyskum flaggi, sersambandið skal hava altjóða limaskap

*2. bólkur:* Ítróttafólk sum hava rokkið ella kunnu røkka topp 5 í NM ella 3 í NJM, ella í samsvarandi kapping í styrki, skulu kappast undir føroyskum flaggi

*3. bólkur:* Ung ítróttafólk við ágrýtni og evnum at vinna heiðursmerki í altjóða kappingum.

Minsta krav fyri at fáa stuðul frá Úrvali er, at ítróttafólkið er føroyingur (sambært evstulóg ÍSF), er limur í einum føroyskum ítróttafelag og kappast í FM.

Stuðulin, ið verður latin, kann verða nýttur til: kappingar, venjingarlegur, venjarar, fysioterapeut og annað eyka virksemi hjá ítróttafólkinum, sum sersambandið ikki vanliga luttekur í.

## Oyggjaleikir

### BERMUDA 2013

84 føroysk ítróttafólk luttóku á oyggjaleikunum á Bermuda í døgunum 13.-19. juli 2013. Fyri stóran part av limaoyggjunum, er Bermuda sera fjarskotið, og var samlaða luttakaratalið tí nakað lægri enn vanligt. Hinvegin mettu millum annað Føroyar, at tá fjarskotnar oyggjar hava fingið limaskap í Altjóða Oyggjaleiklafelagskapinum, hava hinar oyggjarnar skyldu at luttaka fjølment, tá hesar fyriskipa leikunum.

Føroyski hópurin ferðaðist longu leiðina yvir um hav við Atlantsflog. Leikirnir á Bermuda vóru serstakir og eksotiskir. Ítróttarliga hildnaðist væl, havandi í huga, at vit ikki høvdu luttakarar við í svimjing, meðan aðrar hjá okkum sterkar ítróttagreinir, sum t. d. bogaskjóting og judo ikki vóru við hesa ferð. Vit vunnu heiðursmerki í badminton, fimleiki, flogbólti, frælsum ítrótti, skjóting, súkkling og triathlon.

Leikirnir á Bermuda fara at standa sterkir í minninum fyri góðu ítróttarligu og sosialu upplivingarnar í vakra umhvørvinum. Samstundis verða teir eisini mintir fyri beiska álvaran, sum rakti ferðalagið, tá tað júst hevði nomið land í Føroyum aftur, tá tveir av leiðarunum innan badminton, Høgni Carlsson og Vilhjálmur Gregoriussen, lótu lív í syrgiligari ferðsluvanlukku á veg av flogvøllinum.

### KOMANDI OYGGJALEIKIR

Fyrireikingarnar til leiðirnar á Jersey í 2015 eru væl ávegis og fara rættiliga at taka dyk á seg í heyst. Leikirnir á Jersey vera í døgunum 27. juni til 3. juli 2015, og vænta fyriskipararnir metluttøku. Vónandi fara nógv føroysk viðhaldsfólk at leggja leiðina til Jersey hesar dagarnar. Føroyar eru tiltiknar fyri sínar eldhugaðu fjepparar. Leikirnir í 2017 verða í Gotlandi.

### OYGGJALEIKIR Í FØROYUM AFTUR

Seinastu árini hevur verið arbeitt miðvíst fyri, at Føroyar aftur kunnu gerast vertur fyri oyggjaleikunum. Leikirnir í 2019 vera teir fyrstu, har vertsoyggin skal finnast við samráðingum heldur enn við eini kapping millum áhugaðu oyggjarnar.

Leikirnir eru vaksnir nógv, síðani teir seinast vóru í Føroyum - í 1989 - úr eini 900 luttakarum upp í einar 2.500. Tá hýstu vit 11 ítróttagreinum. Ein av hesum, skjóting, inniheldur nú nógv fleiri sløg av skjóting, enn hon hevði tá. Somuleiðis er kravið nú, at vit í minsta lagi skulu bjóða fram 12 ítróttagreinir. Arbeitt hevur tí verið saman við politisku myndugleikunum fyri at útvega eina golfbreyt, umframt at ábøtur mugu gerast innan eitt nú skjóting og bogaskjóting.

Bæði Menorca og Føroyar hava víst áhuga fyri at hýsa leikunum í 2019 ella 2021, og hevur altjóða oyggjaleikanevndin havt samráðingar við báðar partar seinastu árini. Eisini hevur Altjóða Oyggjaleikanevndin fylgt væl við, hvørt lovaðu útbyggingarnar verða gjørdar sambært settu tíðarfreistunum. Føroyar hava seinastu tíðina ligið betur fyri at fáa leikirnar í 2019, men fer hendan støðan ivaleyst at broytast, eftirsum ætlaða verkætlanin við golfvølli ikki er farin í gongd enn. Eftir ætlan skuldi verið sett á at grava í vár, men eftirsum hetta ikki er gjørt, verður øll verkætlanin seinkað, og hevur hetta beinleiðis ávirkan á vertskapin hjá Føroyum í 2019.

Ítróttasamband Føroya hevur umrøtt allar møguleikar. Í verandi stund er ikki møguleiki at skipa fyri neyðugu 12 ítróttagreinunum, eftirsum lendisviðurskiftini fyri skjóting við boga ella byrsu og golf ikki eru komin uppá pláss.

Hinar ítróttagreinarnar, ið standa á listanum hjá IIGA, sum kunnu vera á leikunum, vera ikki iðkaðar í Føroyum ella hava vit ikki umstøður at skipa fyri hesum heldur.

Nevnast kunnu squash, bowls og sigling við Laser-jollum, sum ikki eru ítróttagreinar, vit hava her.

*Minningarorð Vilhjálmur og Høgni*

## Sorgarboð

Tað er við tungum hjarta, at vit í føroysku ítróttarrørsluni drýpa høvur, nú tveir av okkara fremstu ítróttarleiðarum mistu lívið í skelkandi og syrgiligu ferðsluvanlukkuni í gjár.

Høgni Carlsson og Vilhjálmur Gregoriussen vóru á veg heim eftir Oyggjaleikirnar á Bermuda, har teir høvdu verið leiðarar hjá badmintonlandsliðinum.

Lítið grunaðu vit, at sorgin bíðaði okkum øllum, tá vit glað komu heim frá oyggjaleikunum, sum annars høvdu verið so sera minniligir við upplivingum fyri lívið.

Høgni og Vilhjálmur vóru alt tað, sum vit ynskja frá okkara ítróttarleiðarum. Teir vóru nærlagdir í síni tænastu fyri ítróttin her heima, og tá okkara ítróttarfólk kappast úti í heimi.

Hesa vikuna á Bermuda vóru teir støðugt í badmintonhøllini, har teir, alt teir vóru mentir, stuðlaðu okkara badmintonspælarum, so tey kundu nýta alla sína orku til sínar kappingar.

Teir syrgdu eisini fyri, at tey við áhuga fyri badminton kundu fylgja við á netinum, uttan mun til hvar í heiminum tey vóru stadd.

Badmintonítróttin og føroyska ítróttarrørslan sum heild hava mist tveir av sínum fremstu ítróttarleiðarum. Vit skylda teimum at halda fram við sama góða arbeiði, sum teir vóru so glaðir fyri.

Men størsta tapið er tað hjá tykkum, ið varða av teimum, sum fóru í ferðsluvanlukkuni. Í løtuni ráða sorgin og vónloysið.

**Vit ynskja tykkum øllum, ið varða av, Harrans styrk í hesum og komandi døgum.**

*Vegna Ítróttasamband Føroya*
**Petur Elias Petersen, forseti**















Tennisvøllir eru ikki nóg mikið av heldur. Neyðugt er við minst 6 vøllum. Triathlon kann heldur ikki fyriskipast, vegna tess at sjógvurin er ov kaldur her. Kurvabóltur er ein ítróttagrein, ið bert nøkur fá íðka, og er ikki skipað grein sum so.

Eitt av høvuðsendamálunum við at fáa Oyggjaleikirnar aftur hendan vegin, og vera vertur fyri teimum er, at leikirnir skulu leggja nakað eftir seg – skulu vera við til at menna føroyska ítrótt, herundir eisini ítróttaanlegg.

Seinast Føroyar vóru vertir fyri leikirnar, í 1989, varð fyrsta økið til frælsan ítrótt í Føroyum gjørt. Ætlanin var m.a., at golfvøllurin og onnur verkløg skuldu vera eitt ítøkiligt úrslit av leikunum í 2019.

Tað er greitt, at fyriskipanin av oyggjaleikunum fer at seta stór krøv til sjálvboðin eins væl og stuðlar. Tí metir Ítróttasamband Føroya, at leikirnir eiga at síggjast aftur í føroyskari ítrótt – við varandi týdningi, og ikki bert sum eitt vikulangt tiltak.

Á aðalfundinum á Jersey í summar fara limaoyggjarnar í IIGA at taka endaliga støðu um, hvør skal hýsa leikunum í 2019.

## ALTJÓÐA VIÐURSKIFTI ANNARS

Ítróttasamband Føroya hevur sum vanligt luttikið á tiltøkum hjá teimum altjóða felagsskapum, sum Føroyar hava limaskap í. ENGSO hevði aðalfund í mai 2014, ÍSF luttók á fysta sinni á ráðstevnu hjá felagsskapinum TAFISA á heysti 2013, og føroysk umboð vóru við á aðalfundinum hjá Evropeisku Olympisku nevndini í desember 2013.

Grønland var vertur fyri árliga fundinum millum norðurlendsku ítróttasambondini í september 2013. Forsetin, Petur Elias Petersen, bar fram heilsan á veitsluni, sum var í sambandi við at Grønlendska Ítróttasambandið hátíðarhelt sín 50-ára stovningardag. Eisini fekk formaðurin í Grønlendska Ítróttasambandinum, Nuka Kleemann, handaða gullnál ÍSF.

Okkara ráðgevar luttóku í konsulenttreffinum hjá Danska Ítróttasambandinum í apríl 2014. Hesar ráðstevnur geva ráðgevunum hjá ÍSF atgongd til eitt netverk av ráðgevum hjá donsku sersambondunum. Hesuferð var tiltakið skipað soleiðis, at tann fyrra dagin varð skipað fyri einum sokallaðum „Innovatiónscamp“. Endamálið var at menna og lýsa modellir, tilráðingar og møguligar loysnir til nakrar av teimum grundleggjandi avbjóðingum, sum ítróttafelagskapir hava komandi árini. Seinna dagin luttóku føroysku umboðini í bólki, sum m.a. viðgjørdi leiklutin hjá ráðgevunum, tá hesir fara á vitjan hjá feløgum.

## TØKK

Nú Ítróttasamband Føroya gjørdist 75 ár eiga vit at veita eina serstaka tøkk til teirra, sum hava verið virkin innan føroyska ítrótt øll hesi árini: nevndarlimir í feløgum, sersambondum og ÍSF, venjarar, leiðarar og hjálparfólk annars, øll tey virknu ítróttafólkini í øllum aldrum. Hesi árini hava vit óivað rokkið ein stóran part av Føroya fólki. Týdningurin, sum ítróttin hevur havt og hevur fyri føroysku fólkaheilsuna og føroyska samleikan má ikki undirmetast.

Góðu upplivingarnar hjá okkum øll hesi árini eru kunngjørdar og varpaðar út av ágrýtnum tíðindafólkum. Bæði her heima og úti í verð, har føroyingar eru við í ítróttakappingum, eru føroyskir fjølmiðlar á síðulinjuni. Tey skulu hava eina tøkk fyri sín virkna leiklut undir skiftandi korum og í skiftandi miðlalandslagnum hesi árini.

Myndugleikarnir, bæði hjá landi og kommunum, hava frá fyrstu tíð sæð, hvønn týdning ítróttin hevur bæði sosialt og heilsuligt. Takk fyri, at tit áhaldandi útvega ítróttini karmar til virksemi sítt. Góðir karmar leggja lunnar undir sjálvbodna virksemið kring landið.

Sjálvbodna ítróttarørslan lyftir í felag, men hevur eisini tørv á fíggjarligum stuðli. Takk til stovnar og fyritøkur, sum støðugt stuðla ítróttini – ikki bara fyri egið lýsingarvirði, men tí at tær við stuðli til ítróttina bera aftur til kundar sínar og viðskiftafólk – Føroya fólk.

Tað er við góðum treysti, at vit fara undir eitt nýtt ár. Nógvar spennandi avbjóðingar eru fyri framman. Hetta er nakað, ið ítróttin lærir okkum – altíð at líta frameftir.

## Vitjan í Íslandi

Í døgunum 7. - 10. mars vóru nevnd og umsiting á vitjan hjá Íslendska ítróttarsambandinum ISI. Endamálið við ferðini var at knýta tættari samband við íslendska ítróttasambandið og at seta seg meira inn í ymsu skipanirnar hjá teimum.

ÍSF fekk eina gjølla frágreiðing um virksemið hjá ISI, sum heldur til í Laugardali. Nomið varð m.a. við stuðulsskipanir, úrvalsítrótt, skráseting av ítróttafólki o.a.

Fríggjadagin 7. mars handaði Petur Elias Petersen, forseti ÍSF, Helgu Steinunn Guðmundsdóttir, varaforseta, og Gunnari Bragason, peningarøkli í Íslendska Ítróttasambandinum silvurmerki ÍSF fyri gott samstarv og stuðul av føroyskari ítrótt.

Silvurmerkini vóru handaði undir døgurða, sum Íslendska Ítróttasambandið bjóðaði nevnd ÍSF.

**Nevnd og umsiting høvdu somuleiðis ein innanhýsis arbeiðsdag, meðan vitjað varð í Íslandi.**







# **Heiðursmerki** – BERMUDA 2013

*(listin finst her http://www. natwestislandgames2013results. com/medal. aspx?ShowWinners=True&IslandID=6)*

| Ítróttur | Grein | Luttakari | Heiðursmerki |
|---|---|---|---|
| Athletics | 10, 000m Men | Marnar Djurhuus | Bronze |
| Athletics | 10, 000m Women | Valborg Heinesen | Gold |
| Athletics | 5, 000m Men | Marnar Djurhuus | Bronze |
| Athletics | Discus Men | Heri Ziska | Bronze |
| Athletics | Half Marathon Women | Valborg Heinesen | Gold |
| Athletics | High Jump Men | Øssur Debes Eiriksfoss | Silver |
| Athletics | Javelin Men | Rógvi Højgaard | Bronze |
| Athletics | Triple Jump Men | Øssur Debes Eiriksfoss | Silver |
| Badminton | Mixed Doubles | Carlsson R - Eysturoy N | Gold |
| Badminton | Team Event | Faroe Islands | Bronze |
| Badminton | Women's Doubles | Carlsson R - Carlsson B | Silver |
| Badminton | Women's Singles | Rannvá Djurhuus Carlsson | Bronze |
| Cycling | Men's Individual Mountain Bike Cross Country | Helgi Winther Olsen | Bronze |
| Cycling | Men's Individual Road Race | Torkil Veyhe | Silver |
| Cycling | Men's Individual Time Trial | Torkil Veyhe | Silver |
| Cycling | Women's Individual Time Trial | Súsanna Skylv Sørensen | Bronze |
| Gymnastics | Men's SET Individual High Bar | Jóni Brandsson Christiansen | Silver |
| Gymnastics | Men's SET Individual Parallel Bars | Aron Jacobsen | Bronze |
| Gymnastics | Men's SET Individual Rings | Øssur Debes Eiriksfoss | Silver |
| Gymnastics | Men's FIG Individual Floor | Øssur Debes Eiriksfoss | Silver |
| Gymnastics | Men's FIG Individual Parallel Bars | Øssur Debes Eiriksfoss | Silver |
| Gymnastics | Men's FIG Individual Rings | Valerijs Savins | Gold |
| Gymnastics | Men's FIG Individual Rings | Øssur Debes Eiriksfoss | Silver |
| Gymnastics | Men's FIG Individual Rings | Bogi Berg | Bronze |
| Gymnastics | Men's FIG Individual Vault | Øssur Debes Eiriksfoss | Gold |
| Gymnastics | Men's FIG Individual Vault | Bogi Berg | Bronze |
| Gymnastics | Men's SET Individual Vault | Øssur Debes Eiriksfoss | Gold |
| Gymnastics | Men's SET Individual Vault | Bogi Berg | Silver |
| Gymnastics | Men's SET Individual Vault | Aron Jacobsen | Bronze |
| Gymnastics | Team Floor & Vault Men's | Faroe Islands | Gold |
| Gymnastics | Team Floor & Vault Women's | Faroe Islands | Bronze |
| Shooting | Automatic Ball Trap Team - Men | Faroe Islands | Bronze |
| Shooting | Olympic Skeet Individual - Men | Marius F. Joensen | Gold |
| Shooting | Olympic Skeet Team - Men | Faroe Islands | Gold |
| Triathlon | Men's Individual | Gudmundur Joensen | Silver |
| Volleyball | Women's Volleyball | Faroe Islands | Gold |



Nevndin fyri Føroya Ítrótttasavn.

Aftast f.v.: Andras Sólstein, Petur Ove Petersen, Palli Ziskason.
Fremst f.v. Katrin Joensen, Jóhannes Joensen, formaður



Stjórnin 2014.

PRENT: FØROYAPRENT I SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705